**ALMANNAMÁLARÁÐIÐ**

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

10. juli 2014
**Mál**: 13/00817-5
**Tygara Skriv**:
**Viðgjørt**: HE

Soljóðandi skriv er í dag send Marin Katrinu Frýdal

**"Viðv. kæru um nokta serynski í gerðabókina samb. § 25, stk. 2 í kommunustýrislógini**

Almannamálaráðið hevur við teldubrævi, dagfest 5. november 2013, fingið eina kæru frá tygum, um at borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, á býráðsfundi 31. oktober 2013, noktaði tygum sum býráðslimur, at fáa serynski tygara felt í gerðabókina. Tygum upplýsa í kæruni, at tygum tóku undir við fíggjarætlanini, men at tygum høvdu eina viðmerking um, at gera eina umraðfesting á § 5, mentan og frítíð. Harumframt hava tygum upplýst, at borgarstjórin noktaði tær at fáa tygara serynski felt í gerðabókina, og vísti á, at tygum kundi sett tygara serynski undir atkvøðugreiðsluni. Hetta vildu tygum ikki, tí tygum mettu, at so hevði málið ivaleyst fallið og tá vendist ikki aftur. Tygum vildu tí heldur geva býráðslimum høvi til at hugsa um málið til næstu viðgerð av fíggjarlógini.

**Avgerð**

Kæra tygara er ikki gingin á møti

**Viðmerkingar frá Almannamálaráðnum**

Sambært § 25, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin) kann kommunustýrislimur krevja sína serstøðu viðmerkta í gerðabókina, um so er, at hon viðvíkur einum máli, ið hevur verið viðgjørt á fundi. Sambært viðmerkingunum, skal serstøðan staðfesta, hvat kommunustýrislimurin heldur, at kommunustýrið átti at havt avgjørt ella samtykt. Hvørki í lógini ella í viðmerkinginum til lógina er orðið 'serstøða' nærri nágreinað.

Kommunustýrislógin er smíða við íblástri úr danskari lóggávu á økinum, og tí er náttúrligt at hyggja at danskari lóggávu í teimum førum, har tann føroyska lóggávan ikki er heilt greið. Í donsku kommunustýrislógini, er ein samsvarandi áseting í § 13, stk. 2, ið er soljóðandi: *"Ethvert medlem, som har deltaget i mødet, kan forlange sin afvigende mening kort tilført beslutningsprotokollen..."*

Í viðmerkingunum til hesa áseting stendur, at *"Der skal være overensstemmelse mellem den afvigende mening og medlemmets stemmeafgivning."*

**Niðurstøða**

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

Sambært upplýsingunum frá tygum, kann Almannamálaráðið staðfesta, at tygum tóku undir og atkvøddu fyri fíggjarætlanini. Kortini høvdu tygum hava eina viðmerking viðvíkjandi umraðfesting á § 5, mentan og frítíð og ynsktu tygum at fáa hesa viðmerking felt í gerðabókina.

Sambært § 25, stk. 2 í kommunustýrislógini, kann kommunustýrislimur krevja sína serstøðu viðmerkta í gerðabókina. Sambært viðmerkingunum til hesa áseting skal serstøðan staðfesta, hvat kommunustýrislimurin heldur, at kommunustýrið átti at havt gjørt ella samtykt. Almannamálaráðið er av teirri fatan, at man í eini gerðabók ikki kann hava eina viðmerking, sum sigur, hvussu samdur man er í eini avgerð, t.v.s. um man heilt og partvís tekur undir við avgerðini. Hinvegin hevur ein kommunustýrislimur møguleika fyri at atkvøða ímóti, um viðkomandi ikki er heilt samdur við fíggjarætlanini, og tá hava eina viðmerking um, hví ikki kann takast undir við henni.

Tá tygum taka undir við fíggjarætlanini og atkvøða fyri, men hava eina viðmerking til eina umraðfesting, er ikki heilt greitt hvat tygum vilja, tí samsvar er ikki millum tína atkvøðu og tína viðmerking. Tískil staðfestir viðmerkingin ikki, hvat tygum, sum kommunustýrislimur, heldur, at kommunustýrið átti at havt gjørt ella samtykt. Henda hugsjón Almannamálaráðsins verður eisini stuðla av donsku viðmerkingunum til § 13, stk. 2, sum sigur, at *"Der skal være overensstemmelse mellem den afvigende mening og medlemmets stemmeafgivning"*

Niðurstøðan hjá Almannamálaráðnum er tískil, at um tikið verður undir við eini avgerð, ber ikki til at fáa eina viðmerking felda í gerðabókina, um so er, at viðmerkingin ikki samsvarar tí, sum kommunustýrislimurin hevur atkvøtt fyri. "

Sagt verður frá hesum.

Vegna Almannamálaráðið

Hilmar Høgenni

deildarstjóri